# SUMBIAR KOMMUNA

## Samandráttur av fundarsamtykt kommunustýrisfundur 16. febr. 2012

| | |
|---|---|
| Mál nr. 01/02<br><br>Tilboð asfaltering, Sumba | Til 1:<br><br>3 tilboð komu inn.<br>Samtykt var at taka av tilboðnum frá HJ-asfalt.<br><br>Fyri at kunna asfaltera allan teinin sum tilboð er komin inn uppá, er neyðugt at avseta kr. 600.000,00 afturat til øki 3. |
| Mál nr. 02/02<br><br>Avseting kr. 155.950,00 til innbúgv Hamragarð (2.viðgerð) | Til 2:<br><br>Samtykt at avseta kr. 155.950,00 til innbúgv Hamragarð. |
| Mál nr. 03/02<br><br>Uppskot at játta kr. 600.000,00 til asfaltering í kommununi (1. Viðgerð) | Til 3:<br><br>Samtykt at flyta kr. 600.000,00 av innistand-andi til asfaltering í Sumba. (NH atkvøddi ikki) |
| Mál nr. 04/02<br><br>Áheitan um at gera eitt møti-víkipláss eysturi á Løgum | Til 4:<br><br>Samtykt er at fara at hyggja at økinum áðrenn støða verður tikin. |
| Mál nr. 05/02<br><br>Umsókn um stuðul frá:<br>a) Dreingjaliðið hjá FC-Suðuroy<br>b) Nýggjársnevndin Sumba<br>c) Bygdarhúsið í Lopra<br>d) Umsókn frá Livar Nysted | Til 5:<br><br>Soleiðis samtykt til:<br>a) Kr. 1.000,00 (EyT var ikki við til viðgerðina)<br>b) Málið útsett til seinni fund<br>c) Samtykt at játta kr. 105.000,00. Játtanin verður fíggja við at flyta kr. 50.000,00 frá garð á Økrum og kr. 55.000,00 frá skúlanum í Sumba (1. Viðgerð)<br>d) Samtykt ikki at stuðla |
| Mál nr. 06/02<br><br>Støðutakan til keyp av lendi matr.nr. 151c í Lopra | Til 6:<br><br>Fleiri uppskot komu fram um hvussu nógv stykki skuldi keypast fyri (NH kr. 10.000,00 – BB kr. 60,00 m2 – EyT kr. 57,87 m2 – HV kr. 50,00 m2)<br><br>Samtykt at keypa lendi fyri kr. 25.000,00 (NH atkvøddi ikki) |
| Mál nr. 07/02<br><br>Asfaltering av uml. 60-70 m2 í Lopra | Til 7:<br><br>Samtykt at asfaltera økið |